## Pedagogar og hjálparfólk

**Í Barnagarðinum á Teiginum heima á Sandi eru 4 størv leys at søkja. Størvini, ið setast skulu, eru:**

**30 tímar/viku** í útibarnagarðsbólkinum "Lítla Teigi", har børnini eru í aldursbólkinum 4 – 7ár. Starvið er fyribilsstarv í 2 mánaðir fyri hjálparfólk í farloyvi. Starvið verður sett 15. mars 2007.

**25 tímar/viku** í "Lítlulon", har børnini eru í aldursbólkinum 0-2 ár. Starvið er fyribilsstarv fyri hjálparfólk í barnsburðarfarloyvi í 4 mánaðir. Starvið verður sett 15. mars.

**25 tímar/viku** í "Miðlon", har børnini eru í aldursbólkinum 2-4 ár. Hetta starvið verður sett 1. mai, 2007.

**30 tímar/vikuna** somuleiðis í "Miðlon". Starvið er fyribilsstarv í ½ ár fyri pedagog í barnsburðarfarloyvi. Starvið verður sett 15. mars.

**Krøvini til tín eru:**
- at tú er fyrikomandi og erligur
- at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ábyrgdarfult í samráð við børn og starvsfelagar
- at tú heldur arbeiði við børnum í ávikavist 0-2 ár, 2-4 ár og 4-7 ára aldri vera spennandi og avbjóðandi
- at tær dámar at verða úti í øllum veðrið
- at tú dugir at síggja møguleikar heldur enn avmarkingar
- at tú er nærverandi og dugir at lurta
- at tú vil verða við til at menna barnagarðin og tað arbeiði vit hava sett okkum fyri

Størvini verða lønt smbært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Upplatingartíðin í barnagarðinum er frá kl. 7.30-17.30 allar gerandisdagar.

Tú fært nærri upplýsingar um størvini, um tú vendir tær til Lailu M. Petersen, stovnsleiðara á tlf. 361750/212751.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast til Sjálvsognarstovnin Barnagarðin á Teiginum, Koytugøta 1, FO-210 Sandur. Umsóknarfreistin er úti 07.03.07. Allir umsøkjarar fáa svar.

**Sjálvsognarstovnurin**
**Barnagarðurin á Teiginum**

## Pedagogur ella hjálparfólk til farloyvisstarv

Hevur tú hug at arbeiða á lítlum dagstovni í hugnaligari bygd, so er hetta møgliga nakað fyri teg.

Dagstovnurin í Kvívík søkir pedagog í avloysarastarv fyri barsilsfarloyvið frá **1. apríl 2007** ella eftir nærri avtalu.

Talan er um eitt 3/4 starv, sum verður skipað soleiðis at arbeitt verður fulla tíð í tríggjar vikur ímeðan tann 4. vikan er frívika.

Tann setti kemur at arbeiða bæði í barnagarðinum og í frítíðarskúlaskipanini.

Løn og setanartreytir eru samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðarafelag Føroya.

Dagstovnurin í Kvívík er samansettur stovnur, sum heldur til í tveimum ymiskum húsum í bygdini. Ein vøggustovubólkur við 10 børnum og ein barnagarðsbólkur við 20 børnum eru í tí eina húsinum, ímeðan ein bólkur við 5 av teimum elstu barnagarðsbørnum og 11 børnum í skúlaaldri er í einum øðrum húsum í bygdini.

Vit kunnu bjóða hugnaligar arbeiðsumstøður, fitt og krevjandi børn og góðar starvsfelagar.

Innandurða hava vit ikki nógv pláss, men vit hava góðar møguleikar fyri at brúka náttúruna og nærumhvørvið.

Okkara mál við arbeiðinum er at skapa tryggar og mennandi umstøður fyri børn og vaksin innanfyri teir karmar, sum kommunan setur fyri virksemi okkara.

Vit ynskja umsøkjara við viðkomandi útbúgving og royndum, hugi at arbeiða við børnum, hugflogi og løttum sinnalag.

*Meira kann fáast at vita um starvið og viðurskiftini við at tosa við Siborg Arge, leiðara, á telefon 214360.*

Umsóknir við prógvum, viðmælum og CV skulu vera stovninum í hendi innan **5. mars 2007.**

Um starvið ikki verður sett við pedagogi, so verður tað sett við fólki við ørum førleika.

**KVÍVÍKAR KOMMUNA**
**Víkarvegur 5 • FO-340 Kvívík**

TVØROYRAR KOMMUNA

## Søkt verður eftir dagrøktara

Dagrøktarskipanin í Tvøroyrar kommunu søkir eftir dagrøktara fyri dagrøktara sum fer í annað starv, at byrja 1. mars 2007

Vit ynskja, at tú:
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- Ert álítandi og hevur góð samstarvsevni
- Ert tolin og vísir umsorgan
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini
- Dugir at síggja møguleikar ístaðin fyri forðingar

Í dagrøktarskipanini starvast 17 dagrøktarar og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 75

Ein dag um vikuna eru 3-4 dagrøktarmammur saman við børnunum í spælistovuni

Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 - 17.15

Nærri fæst at vit um starvið við at ringja til tlf. 21 13 39 og tosa við Súsannu Poulsen

Vinarliga send umsókn tykkara til:

**TVØROYRAR KOMMUNU**
**Dagrøktarskipanin**
**800 Tvøroyri**

**Atlanticpane** P/F
Tlf.: 42 14 05 • Fax 42 16 02

## Fólk søkist

Kundi tú hugsað tær at verði ein av okkara.
Vit sóknast eftir einum fólki at arbeiða hjá okkum. Byrjast kann beinanvegin. Arbeiðið er fjølbroytt, bæði innan- og uttandurða. Vit framleiða termorútar og alt innan glas / spegl og innrammingar.

Vit ynskja tú hevur:
- Góðan samstarvsvilja
- Ábyrgdarfull/ur
- Arbeiða sjálvstøðg/ur
- Góða uppmøting
- Koyrikort

um so er send okkum nakrar reglur.

**Atlanticpane P/F**
Postsmoga 30
410 Kollafjørður

## KOYRIKORT?
## EYSTUROYINGAR

**Nýtt teoriskeið byrjar mikudagin 21. februar 2007 kl. 18:00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Hugo Kristiansen | 225225 |
| Jari Lykke | 503002 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |




**EYSTUROYAR TEORISKÚLI**

## Aðalfundur hjá Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelags

Aðalfundur grunnsins verður **leygardagin 17. mars kl. 15.00** í B36-húsinum í Gundadali, Tórshavn.

**Dagsskráin:**
- Sambært viðtøkum grunsins,
- Møgulig lógarbroyting

**Eftirlønargrunnur Føroya**
**Arbeiðarafelags**